# Strandferðslan lærir av kiksara

## Framyvir fer Smyril kanska at bunkra í Vági

**SMYRIL** Strandferðslan fer nú at gera kalendara, so at øll vita í góðari tíð, nær Smyril bunkrar olju og tískil noyðist at broyta ferðaætlanina

Áki Bertholdsen

Nú skulu ferðafólk hava at vita í góðari tíð, nær Smyril noyðist at broyta ferðaætlanina fyri at bunkra olju.

Mikudagin varð funnist at Strandferðsluni fyri at hon legði ein túr burtur ímillum, tí at Smyril skuldi inn á Sund at bunkra olju.

Ein avleiðing av tí var, at yvir 100 fólk hjá nærverkinum máttu avlýsa ítróttardagin, sum ætlanin var at hava í Hvalba.

Men Strandferðslan ætlar ikki, at hetta skal endurtaka seg.

Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari hjá Strandferðsluni, sigur, at tey fara nú at gera ein kalendara, so at øll vita í góðari tí, nær ferðaætlanin verður broytt av tí, at Smyril bunkrar olju.

Hann leggur afturat, at fyri at órógva sum minst, fer bunkringin hereftir eisini at verða flutt frá mikudegi, tá ið Smyril siglir tríggjar túrar, til týsdag, tá ið bara tveir túrar eru.

Eftir hesum slepst undan at avlýsa nakran túr, tí tá er nokk at flyta eina fráferð úr Havn nakað.

Men tey neyðugu fyrivarnini mugu so altíð takast veðri og vindi.

Rakstrarleiðarin sigur, at hetta verður gjørt fyri at órógva ferðavinnuna, aðra vinnu og ferðafólk annars, sum minst.

Støðan er tann, at Smyril siglur so nógv, at tað ber ikki til at bunkra olju uttan at órógva ferðaætlanina.

Sum nú er, er tað bara á Sundi, at Smyril kann bunkra, tí hann brúka tungolju.

Strandferðslan hevur sáttmála við Magn um at veita olju til Smyril. Men oljan verður goymd í tangunum hjá SEV inni á Sundi og tí noyðist Smyril hagar at bunkra.

### Tríggjar og fýra vikur

Tað tekur góðar tríggjar tímar at bunkra og so kann Smyril sigla tríggjar ella fýra vikur.

- Um summarið kunnu fýra vikur verða ímillum hvørja bunkring. Men tá er so lítið eftir í tangunum, at um veturin er ikki ráðiligt at hava meiri enn tríggjar vikur ímillum hvørja bunkring, sigur rakstrarleiðarin.

Hann sigur, at tað kann vera so nógvur súður á Sundi, at bunkring kann verða útsett fyri veður og tí má Smyril altíð hava so mikið av olju í tangunum til at hann kann sigla eina viku ella tvær, eyka.

Men hví bunkra tit ikki um náttina fyri at sleppa undan at órógva ferðaætlanina?

- Tað er tí, at so koma vit í stríð við hvíldarreglarnar hjá manningini. Skulu vit bunkra um náttina, skulu vit sostatt hava eykamanning. Tað er bæði dýrt og tvørligt, tí talan skal vera um manning, sum av trygdarávum kennir skipið og umstøðurnar umborð rættiliga væl av fyri at forða fyri mistøkum og óhappum undir bunkring.

*aki@sosialurin.fo*




**SMYRIL OG BUNKRING**

*Strandferðslan ætlar ikki at tað skal endurtaka seg, at ferðafólk verða tikin á bóli av tí at Smyril noyðist at fylla tangarnar*

# Oljan til Smyril bjóðast út

**SMYRIL** Strandferðslan fer nú at bjóða tænastuna at lata olju til Smyril, út og tað kann enda við at hann hereftir fer at bunkra í Vági

Áki Bertholdsen

Á nýggjárinum gongur sáttmálin ímillum Strandferðsluna og Magn um oljuveitingina til Smyril, út.

Tí fer Strandferðslan í næstum at bjóða oljuveitingina til Smyril út.

Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni, sigur, at talan er um tveir veitrarar, ið kunnu koma upp á tal og tað eru tey bæði oljufeløgini, Magn og Effo.

Hevur Effo besta tilboðið, skal Smyril inn á Fuglafjørð at bunkra, tí har hevur Effo sína goymslu av tungolju.

Tað fer helst at krevja broytingar í ferðaætlanini, tí tá fer nógv tíð til sigling. Ella má onkur skipan gerast, so at Smyril kann bunkra leygarnátt.

Men tá var ætlanin, at Smyril skuldi liggja í Havn, so at fólk, sum skulu suður tíðliga leygarmorgun, skulu kunna gista umborð.

Men vinnur Magn útbjóðingina, er hinvegin møguleiki fyri at Smyril framyvir fer at bunkra í Vági.

Magn letur nevniliga tungolju til SEV og tað er haðani, at Smyril bunkrar oljuna.

SEV hevur eisini tangar í Vági vinnur Magn útboðið, fera Strandferðslan at kanna møguleikarnar fyri at lata Smyril bunkra í Vági ístaðin fyri á Sundi.

Men skal tað lata seg gera, verður neyðugt við nýggjum bryggjukanti við tangarnar hjá SEV í Vági fyri at Smyril skal kunna liggja trygt og væl bundin ímeðan bunkrað verður.

Men í Vági er so tann fyrimunur, at har er altíð deyðavatn inni á fjørðinum, so at Smyril kann altíð bunkra har. Á Sundi kann verða so nógvur súður í sjónum, at Smyril fær ikki ligið har og tað kann órógva bæði bunkring og ferðaætlan meiri enn gott er.

*aki@sosialurin.fo*

# Mugu fáa trygd

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, staðfestir, at tað er lættari sagt enn gjørt at fáa Smyril til Vágs at bunkra olju.

Hon váttar, at Vágs Býráð hevur fingið fyrispurning frá Strandferðsluni um hetta. Men skal tað lata seg gera, er fyrst neyðugt at gera atløgubryggju við oljutangarnar í Vági og fyrsta tilboðið, býráðið fekk upp á tað, ljóðaði upp á tvær milliónir krónur.

Síðani hevur kommunan kannað møguleikarnar fyri eini bíligari losyn, men endaligi prísurin er ikki greiður enn.

Hinvegin staðfestir hon eisini, at hetta er ikki ein íløga, sum kommunan fer undir uttan at fáa vissu fyri, at hon fær inntøkur burtur úr tí.

Áðrenn nakað verður gjørt, vil býráðið tískil fyrst hava trygd frá Strandferðsluni fyri, at Smyril veruliga kemur til Vágs at bunkra og hann fer at bunkra í Vági í eina tíð framyvir, so at kommunan fær íløguna inn aftur.

Og so langt er málið als ikki komið enn.